


## MASKINMEISTARAR søkjast til Elfelagið SEV

*Í sambandi við at motorar á Sundsverkinum skulu hava høvuðseftirlit / yvirháling, verður sókt eftir tveimum maskinmeistarum.*

**Starvið:**
Sundsverkið hevur 5 dieselmotorar upp á tilsamans 46,7 MW. Brennievnið er tungolja.
Teir báðir maskinmeistararnir, sum sókt verður eftir, skulu fyrst og fremst luttaka í arbeiðinum at høvuðsumvæla motorarnar og annars luttaka í øðrum umvælingum á verkinum.

*Talan er um tíðaravmarkaði starv.*

**Førleikakrøv:**
Allir maskinmeistarar kunnu søkja størvini. Tað er ein fyrimunur, at viðkomandi hava arbeiðsroyndir í umvælingum av stórum dieselmotorum.

**Lønin:**
Størvini eru lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.
Lønarflokkur og stig verða ásett eftir útbúgving og royndum frammanundan.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við ljósprent av prógvum og møguligum ummælum sendast **Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn** og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin, tann 16. februar 2007.**

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Jákup Sørensen, verksmeistara á Sundsverkinum ella til Berg Didriksen, deildarstjóra á Framleiðsludeildini, báðir á telefon nr. **346800.**

Sosialurin 341800

Elfelagið SEV

## Starvsfólk til inn á Norðskála

Til kassaavgreiðsluna í inn í Norðskála, søkja vit eftir einum dugnaligum og fyrikomandi fólki. Starvið er í dagtímunum mánadag – fríggjadag frá kl. 07.30 – 16.00. Møguligt er at byrja beinanvegin. Hevur hetta tín áhuga er tú vælkomin at seta teg í samband við Jaspur Johannesen á tlf. 774000.

inn
**postsmoga 50**
**460 Norðskáli**

SKÓGRØKT LANDSINS

## Skógrøkt landsins søkir eftir fólki

**Røktari:**
Vegna starvsfólk í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir avloysara í tíðaravmarkað starv sum røktari á Gróðurstøðini (plantuskúlanum) hjá Skógrøkt landsins í Hoydølum. Arbeiðið fevnir um plantualing, -røkt, -royndir, -sølu og kundaráðgeving.

Søkt verður eftir fólki við gartnaraútbúgving ella við viðkomandi royndum innan økið.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Rakul Dam Lindberg, røktarleiðara, á telefon 210922 ella í telduposti til: rakul@skogroktin.fo

Skrivlig umsókn við avritum av próvskjølum, viðmælum v.m., skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. februar 2007. Umsóknin skal sendast til: Skógrøkt landsins, Hvítanesvegi 3, Postrúm 1174, 110 Tórshavn.

**Lærlingur**
**(plantualing - produktionsgartner):**
Lærupláss sum gartnari í plantualing (produktionsgartner) er leyst at søkja hjá Skógrøkt landsins, á Gróðurstøðini (plantuskúlanum) í Hoydølum. Lærutíðin er 3 ár og 8 mðr., harav 3-4 skúlaskeið (tilsamans 45 vikur) eru á yrkisskúla í Danmark. Verkligi parturin av læruni fevnir um plantualing, -røkt, -royndir, -sølu og kundaráðgeving.

Yrkisútbúgvingar í Føroyum eru skipaðar sambært ásetingum, ið Yrkisdepilin umsitur. Lønin verður eftir ásetingum um lærlingar í sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Á hesum heimasíðum ber til at kunna seg um lærlingaútbúgvingina til gartnara, sí:

www.yrkisdepilin.fo og www.eud-info.dk/uddan/index.asp?indID=4

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Rakul Dam Lindberg, røktarleiðara, á telefon 210922 ella í telduposti til: rakul@skogroktin.fo

Skrivlig umsókn við avritum av próvskjølum, viðmælum v.m., skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2007. Umsóknin skal sendast til: Skógrøkt landsins, Hvítanesvegi 3, Postrúm 1174, 110 Tórshavn.

Skógrøkt landsins er stovnur undir Innlendismálaráðnum og innur uppgávur og áhugamál Skógfriðingarnevndarinnar. Stovnurin skal røkja gamlar og nýggjar viðarlundir og aðrar frílendisuppgávur, sum hoyra uppí. Somuleiðis rekur stovnurin Gróðurstøðina við plantualing, plantusølu og arboretvirksemi.

## Vilt tú verða við?

Í næstum verður nýggjur stjóri settur at leiða Ferðaráð Føroya og Menningarstovuna í nýggjum stovni undir Vinnumálaráðnum.

Nýggi stovnurin hevur tørv á vælútbúnum marknaðarfólki at taka lut í arbeiðinum at menna føroyskan útflutning av vørum, tænastum og upplivingum.

Framanfyri standandi uppgávur eru m.a. at fyriskipa føroysku luttøkuna til European Seafood Exposition 2007 í Brússel, Offshore Europe 2007 í Aberdeen, marknaðarátak fyri cruiseferðir, tiltaksætlan fyri kreativar vinnur herundir AME í Reykjavík, Tórshavn og London ella Manchester, framtak fyri føroyskar tænastur og vørur í Russlandi.

Vit ímynda okkum at umsøkjarar hava útbúgving á kandidátstigi í til dømis handilsskapi, marknaðarføring, búskapi ella hava líknandi útbúgving.

Góðir førleikar í enskum og øðrum altjóða máli og vinnuligar royndir eru ein fyrimunur.
Persónligu eginleikarnir hjá teimum, ið verða sett, skulu sampakka við tær avbjóðingar, ið fara at koma.
Starvs- og setanartreytir verða eftir starvsfólkapolitikki landsins.
Nýggi stjórin í samanlagda stovninum setir fólkini.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Kjartan Kristiansen, fráfarandi stjóra, á telefon 353100.

Umsóknir, ið eiga at verða okkum í hendi innan 19. februar, skulu sendast til:

**Menningarstovan**
**Att.: Kjartan Kristiansen**
**Bryggjubakki 12**
**Postrúm 259**
**FO-110 Tórshavn**

Nýggi stovnurin fer at virka sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi vinnupolitikki landsins, og høvuðsuppgávurnar verða m.a.:

- At birta upp undir nýskapan og íverksetan
- Í samstarvi við aðrar myndugleikar at samskipa mannagongdir innan fyrisiting, sum hava týdning fyri tær einstøku fyritøkurnar.
- At menna føroyska vinnu.
- At marknaðarføra føroyskar vørur og tænastur og Føroyar sum eitt land at gera íløgur í.
- At menna ferðavinnuna í Føroyum og at marknaðarføra Føroyar sum eitt ferðamannaland.

TEAM85